## Ingerð nýggjur leiðari

Ingerð á Rógvu Olsen úr Vestmanna er sett sum nýggjur Kunningarleiðari á Vága Kunningarstovu. Tað kunngjørdi Vága Kunningarstova umvegis heimasíðu sína í gjár, og Ingerð á Rógvu Olsen er sett frá 1. januar 2008. Ingerð er útbúgvin bankafólk frá gamla Sjóvinnubankanum, og hevur eisini tænaraútbúgving á Radisson SAS Scandinavia og varð liðug í 2001. Eftir lokna útbúgving hevur hon arbeitt í Grønlandi á hotel og matstovum, men nú er hon so byrja sum kunningarleiðari í Vágum.



## Politiskur ressingarfundur

Valstríðið er so smátt farið í gongd. Sum tað er vorðið siðvenja, byrjar Tjóðveldi stríðið av álvara við politiskum ressingarfundi í høvuðsstaðnum. Eitt slag av fólkafundi, har røðarar, tónleikarar og skemtarar fara at fylla rúmið eina løtu, nú tvær vikur eru eftir til valið. Fundurin verður í sjónleikarahúsinum og skráin er fjølbroytt. Røður frá Tórbjørn Jacobsen, Tjóðhild PAturssþn, Hergeir Nielsen og Høgna Hoydal, umframt tónleik frá Una Arge og Hera Simonsen, skemt frá Hera Simonsen. Ein gestarøðari verður eisini á fundinum, sum verður fríggjadagin 4. januar kl. 20.00 í Sjónleikarhúsinum.

# Altíð gott við rósandi orðum

**- Tað er altíð gott at fáa nøkur rósandi orð, tað gevur orku til at halda fram, segði Beinta Gregersen, sum á Planet Awards millum jólanna fekk heðurin Ársins Herðaklapp**

PLANET AWARDS
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var Beinta Gregersen í Virkishúsinum í Klaksvík, sum fekk heiðurin sum ársins herðaklapp. Hon fegnaðist sum vera man um heiðurin – og tað, at fólk halda, at tað er gott, sum tey gera har.

- Men tað er eitt sindur undarligt at fáa alt hetta einsamøll, tí tað eru so nógv onnur fólk við í hesum enn eg, men vit fegnast um tað sjálvandi, segði hon við Portallin hetta kvøldið.

Men hvat er tað, sum tit gera har norðuri á Dávavirkinum?

- Dávavirkið er stutt og greitt venjingarhøli. Har eru á høli, sum bólkar kunnu venja í, og so er eitt stórt høli, sum vit vóna at fáa til konserthøll, sigur Beinta Gregersen.

Hon greiddi frá, at tá hon kom norður til Klaksvíkar í 2006 høvdu nakrir menn júst keypt hetta gamla ísvirkið, sum stóð tómt, og teir vistu ikki júst, hvat teir skuldu brúka tað til.

- So hálaði eg nakrar mans við mær, Inga Isaksen og aðrar, og spurdi, um vit ikki kundu gera hetta til konserthøll, og tað útviklaði seg so til hesi venjingarhølini, segði Beinta Gregersen.

- Okkara lutur hevur verið at sett gongd á og at fingið kommununa at seta pengar í og at fingið tónleikararnar við upp á tað.

Hon greiðir frá, at hetta sjálvandi altíð kann gerast betri, enn tað er, men her eru 25 tónleikabólkar, sum venja, so her er nógvur aktivitetur. Talan er bæði um ungar sum eldri tónleikarar, men teir gerast yngri og yngri, og tað er sera stuttligt, heldur Beinta.

Hon vísir á, at Musikkskúlin eisini hevur fingið fótin innumm, og tað ger sjálvandi eisini sítt til, at tey ungu gerast alt meira húsvand á Dávavirkinum.

Alt hetta virksemið hevur verið við til at sett enn meira ferð á tónleikalívið í Klaksvík, sum mangan hevur verið í fremstu røð í landinum, hóast tað kanska ikki er tað beint nú.

- Jú, tað hevur tað heilt víst gjørt. Bara tað at vit hava 25 tónleikabólkar, sum venja her, sigur sítt. Vit høvdu leitaðu eisini við luppi eftir einum klaksvíkbólki at spæla í Virkishúsinum, tá vit fóru í gongd, men nú er tað als eingin trupulleiki, sigur Beinta Gregersen, sum ætlar at brúka ársins herðaklapp til at gera okkurt meira – og til at sleppa enn virkseminum kring Virkishúsið í Klaksvík enn longur fram.



*- Bara tað at vit hava 25 tónleikabólkar, sum venja her, sigur sítt. Vit leitaðu við luppi eftir einum klaksvíkbólki at spæla í Virkishúsinum, tá vit fóru í gongd, men nú er tað als eingin trupulleiki, sigur Beinta Gregersen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Planet Award tiltakið, sum varð hildið millum jólanna var tað triðja í røðini. Hini bæði hava verið hildin á Hotel Føroyum, meðan tiltakið hesaferð varð hildið í Miðlahúsinum og varpað út beinleiðis í radio á Rás 2, samstundis sum Portalurin fylgdi væl við við myndum, teksti og við kykmyndum. Soleiðis var tiltakið varpað út gjøgnum tríggjar miðlar samstundis.

## Javnaðarhugað hittast til veitsluhald

**Eftir 3. uppstillingarfund hjá javnaðarfeløgunum í Suðuroynni, har tingmaður í mong ár legði frá sær, og nýggj uppstilling fór fram, var gjørt av, at veitsla fyri javnaðarhugaðum úr øllum landinum verður í Øravík tann 5. januar**

VEITSLUHALD
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Javnaðarfeløgini í Suðuroynni høvdu herfyri 3. uppstillingarfund í Porkeri, og var huglagið so gott, at fundarfólk samdust um at taka stig til veitslu, ið er ætlað at vera tann 5. januar í Øravík, og er ætlanin at javnaðarhugaðð í øllum landinum kunnu koma á veitsluna.

Fundurin var so góður, frættist frá feløgunum, at huglagið mest minti um góðar gamlar dagar, og birti hetta undir hugskotið um veitslu.

Tey uppstillaðu valevnini høvdu orðið, kjakið var lívligt, og Henrik Old, tingmaður, ið ikki stillar uppaftur, hugleiddi við gaman og álvara, og fekk hann gávu handaða.

### Javnaðarveitsla

Somikið væl gekk fundurin, at luttakarar samdust um at taka stig til veitslu, sum í gomlum døgum, og er vónin, at fólk úr øllum landinum koma á veitsluna. Ferðaætlanin hóskar væl, tí Smyril fer úr Havn leygardag kl. 15:30 og norðuraftur kl. 7:00 sunnumorgun.

Veitslan verður ætlandi í Øravík nú leygardagin 5. januar klokkan 20:00. Trio spælir til dansin og tilmelding fer fram hjá lokalfeløgunum, frættist frá javnaðarfeløgunum í Suðuroynni.

